# Jákup og Partick spældu javnt

**Tað eydnaðist ikki hjá Jákupi Mikkelsen at halda málið reint í sínum næsta venjingardysti fyri Partick Thistle**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*


*Jákup Mikkelsen og Partick Thistle spældu javnt í venjingardysti týskvøldið*
*Savnsmynd*

Týskvøldið spæli Partick Thistle sín triðja venjingardyst undan landskappingini, sum fer av bakkastokki tann 9. august. Jákup Mikkelsen spælir í hesum døgum við skotska Premier League felagnum við tí í hyggju at koma ásamt um ein sáttmála.

Mótstøðuliðið var 3. deildarfelagið Morton, sum hevði heimavøll, og dysturin endaði 1-1.

Partick Thistle legði seg framum miðskeiðis í seinna hálvleiki við máli frá Stuart Taylor. Partick Thistle rakti tvær ferðir tvørstongina í dystinum, men tað eydnaðist tó Morton at javna beint áðrenn leiklok við einum sera flottum máli.

– Jákup Mikkelsen spældi ein góðan dyst, og hann var tryggur, tá boð vóru eftir honum. Tað var lítið hann kundi gera við tað serstakliga flotta útjavnandi málið hjá Morton, stendur at lesa á óalmennu heimasíðuni hjá Partick Thistle (www.ptfc.net).

Hetta var tann triði venjingardysturin hjá Partick Thistle. Tann fyrsta vann Partick 6-1 á útivølli ímóti Ayr United. Tann næsta vann liðið hjá Jákupi 4-2 ímóti Bradford, og hetta var samstundis fyrsti dysturin hjá føroyska málverjanum millum stengurnar.

Leygardagin spælir Partick Thistle á heimavølli ímóti Barnsley. Síðani eru tvey smærri feløg á skránni, áðrenn fyrsta dystin í landskappingini tann 9. august ímóti Livingston.

Spennandi verður at síggja, um Jákup Mikkelsen og Partick Thistle kunnu koma ásamt um ein sáttmála.

# FM í hamarkasti og kúlustoyti

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Stefan í Skorini*


*Randi Kúrberg var einasti kvinnuligi luttakarin í FM-kappingini í hamarkasti og kúlustoyti, sum var týsdagin*
*Savnsmynd*

Bert tríggir luttakarar vóru í FM-kappingini í hamarkasti og kúlustoyti, sum var týsdagin. Hjá monnum vóru tað veteranurin Heri Ziska og tann ungi Jákup Andrias Thomsen, og hjá kvinnunum var Randi Kúrberg einsamallur luttakari.

Eingin ivi var um vinnaran í kappingini í hamarkasti millum Hera og Jákup Andrias. Heri kastaði 43,92 metrar í fyrsta kasti, og hann betraði hetta tvær ferðir. Síðsta og besta kastið hjá Hera var 44,64 metrar, og tað er umleið tveir metrar styttri, enn hann kastaði á Oyggjaleikunum á Guernsey.

Jákup Andrias kastaði tann 7,26 kilo tunga hamaran út á 23,27 metrar, og hetta er nýtt bólkamet. Havast skal í huga, at Jákup Andrias ikki eigur at kasta við einum so tungum hamara fyrr enn næsta ár.

Randi Kúrberg hevur seinastu árini ikki gjørt so nógv við hamarkast, men hon royndi seg týsdagin. Hon kastaði hamaran 27,14 metrar, og tað er persónligt met. Tó er nakað upp til føroyska metið hjá Ingibjørg Poulsen.

Hóast fáir luttakarar vóru, høvdu fleiri áskoðarar leitað sær yvir á kastibreytina við Eysturskúlan at hyggja.

Í kúlustoyti vann Heri Ziska, hóast hann ikki hevur vant hesa grein síðan 1998. Hann stoytti uttan renningarferð ella glide, sum tað kallast. Heri kastaði 11,37 metrar.

Jákup Andrias setti eisini bólkamet í kúlustoyti, og hann kastaði 7,99 metrar. Hann eigur heldur ikki at kasta við tí 7,26 kilo tungu kúluni fyrr enn næsta ár.

Randi Kúrberg kastaði ta 4 kilo tungu kúluna út á 7,94 metrar, sum er nakað niðanfyri hennara besta.

Hósdagin verður kappast um FM í diskokasti og spjótkasti, og kappingarnar vera á kastivøllinum við Eysturskúlan. Byrjað verður klokkan 17 við diskokasti, og spjótkast verður aftaná.

Av tí at hetta er ein FM kapping, kunnu bara limir í teimum trimum feløgunum innan FÍF luttaka. Feløgini eru Bragdið, Treystið og Roysnið.

# Tórshavn Marathon 2003

Av tí at mistøk vóru í listanum frá maraton renningini leygardagin, og øll nøvnini ikki vóru komin við, prenta vit her listan einaferð enn.

Nevnast kann at Hans Birgir Hansen er tann einasti føroyingurin, sum hevur fullført tær báðar maraton renningarnar, sum hava verið í Føroyum. Hann rann á Oyggjaleikunum í 1989 og aftur í Tórshavn Marathon í 2003.

Ta ferðina rann hann teinin uppá umleið tríggjar og ein hálvan tíma. Nú fjúrtan ár seinni nýtti hann 4 tímar 47 minuttir og 17 sekund. Hans Birgir Hansen er 54 ára gamal og var næstelsti luttakarin í hesi kappingini. Tann elsti var Ólavur Herup Olsen, sum er sekti ára gamal.

**Maraton – Menn**

| Pláss | Nr | Fornavn | Eftirnavn | Føddur | Bústaður/Felag | t. | m. | s. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 3 | Cecil | Weihe | 1965 | Bragdið | 2 | 55 | 54 |
| 2 | 11 | Sigurð B. | Justinussen | 1967 | Bragdið | 3 | 5 | 42 |
| 3 | 16 | Hjalti | Gunnarstein | 1961 | Bragdið | 3 | 9 | 51 |
| 4 | 20 | Jósvein Herup | Olsen | 1958 | Bragdið | 3 | 12 | 45 |
| 5 | 27 | Preben | Hansen | 1953 | Danmark | 3 | 28 | 9 |
| 6 | 22 | Gustav | Struck | 1950 | Danmark | 3 | 36 | 16 |
| 7 | 15 | Heini Trond | Hansen | 1958 | Danmark | 3 | 37 | 14 |
| 8 | 1005 | Brian | Bernhardson | 1667 | Miðvágur | 3 | 37 | 18 |
| 9 | 26 | Ólavur Herup | Olsen | 1943 | Bragdið | 3 | 46 | 6 |
| 10 | 4 | Djóni | Ziska | 1965 | Bragdið | 3 | 48 | 10 |
| 11 | 14 | Hanus | Højgaard | 1960 | Bragdið | 3 | 50 | 23 |
| 12 | 25 | Martin V. | Heinesen | 1953 | Toftir | 3 | 51 | 30 |
| 13 | 6 | Jens Hjørleif | Hansen | 1968 | Tórshavn | 3 | 52 | 39 |
| 14 | 5 | Hjalti | Lamhauge | 1980 | Hoyvík | 3 | 54 | 44 |
| 15 | 8 | Jorge | Matauco | 1966 | Mallorca | 4 | 0 | 44 |
| 16 | 2 | Allan | Dalsgarð | 1972 | Danmark | 4 | 3 | 14 |
| 17 | 1 | Robert | Vilhelmsen | 1951 | Bragdið | 4 | 4 | 45 |
| 18 | 19 | Jógvan Edvard | Joensen | 1963 | Bragdið | 4 | 10 | 3 |
| 19 | 18 | Janus | Petersen | 1959 | Bragdið | 4 | 10 | 17 |
| 20 | 7 | Johan Pauli | Johansen | 1972 | Bragdið | 4 | 10 | 55 |
| 21 | 13 | Birgir | Sondum | 1962 | Bragdið | 4 | 13 | 8 |
| 22 | 24 | Holger | Arnbjerg | 1951 | Bragdið | 4 | 14 | 34 |
| 23 | 17 | Jákup-Alberg | Berg | 1963 | Bragdið | 4 | 15 | 53 |
| 24 | 9 | Ragnar | Helmsdal | 1978 | Hoyvík | 4 | 19 | 56 |
| 25 | 10 | Samson | Nesá | 1972 | Norðragøta | 4 | 23 | 57 |
| 26 | 12 | Bent Tommy | Linklett | 1963 | Bragdið | 4 | 44 | 38 |
| 27 | 23 | Hans Birgir | Hansen | 1949 | Bragdið | 4 | 47 | 17 |

**Maraton – Kvinnur**

| Pláss | Nr | Fornavn | Eftirnavn | Fødd | Bústaður/Felag | t. | m. | s. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 29 | Janet Skarðsá | Jacobsen | 1976 | Fuglafjørður | 4 | 5 | 22 |
| 2 | 31 | Majbritt | Vestergaard | 1957 | Roysnið | 4 | 21 | 7 |
| 3 | 30 | Agnes | Hansen | 1954 | Ísland | 4 | 33 | 51 |





Ger kvetti NÚ

Fleri góð tilboð uppá nýggjan bil • Einasta treyt - ongan býtisbil

Volvo S40 1.8 274.850,- kr.
**Uttan býtisbil 254.850,- kr.**
*Við leðurinntrekki + 10.000,- kr.*

**Útgerð:**
- Elegant sfoff/leðurinntrekk (fleiri møguleikar)
- ECC - Automatiskt klimakontrol
- 16" lættmetall felgur (Ares / Gallactica)
- Tokulyktir framman
- Leðurróður og Cruise Control
- Informatiónssentur
- El-rútar aftan og kopphaldari í miðarlen framman
- Make up-spegl við ljósi
- Dupultar parabolir við black effect innlegg
- Originalt radio v/band og 10 cd boks



Renault Mégane 1.6 Stationcar 189.850,- kr.
**Uttan býtisbil 169.850,- kr.**



Renault Scenic 1.6 MPV 209.850,- kr.
**Uttan býtisbil 189.850,- kr.**

**Útgerð:**
- El-rútir framman
- El-spegl við hita
- Aircondition
- Hita í forsterum
- Radio við cd - fjarstýrt frá róðrinum

Sosialurin 341800



Renault Laguna 1.8 H/B 239.850,- kr.
**Uttan býtisbil 219.850,- kr.**

Sí annars brúktar bilar í bilatorginum í Sosialinum í dag á síðu 19

VR BILAR

Sp/f VR-bilar • Hoyvíksvegur 61
P.O. Box 3130 • FO-110 Tórshavn
Tel 322 110 • Fax 322 111

VOLVO RENAULT